LØGBITI NR. 9

# LÓGGÁVUMANNAGONGDIN Í LANDSSTÝRINUM

LÓGARTÆNASTAN

**2. útgáva - oktober 2025**

# Løgbitar

Ætlanin við løgbitunum er stutt at lýsa nøkur yvirskipað løgfrøðilig ella faklig evni, sum tað er gott at hava sum undirstøði, tá ein lóg ella aðrar rættarreglur skulu gerast.

Løgbitarnir eru eitt leiðbeinandi ískoyti til rundskrivið um lógarsmíð.

Løgbitarnir eru gjørdir í samráð við tey stjórnarráð ella myndugleikar, sum hava serligan kunnleika innan økið, sum løgbitin viðvíkur.

Nella Festirstein
Deildarstjóri á lógartænastuni

**Løgbiti nr. 9**

# Lóggávumannagongdin í landsstýrinum

Henda mannagongd er galdandi fyri løgtingslógir, ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar frá Landsstýrinum. Mannagongdin er í størstan mun eisini galdandi fyri kunngerðir, sí nr. 18 hesum viðvíkjandi.

## 1. Hugskot

Alt byrjar við einum hugskoti hjá landsstýrisfólkinum ella stjórnarráðinum. Fyrst má metast um, um hugskotið kann førast út í lívið, uttan at nýggj løgtingslóg verður gjørd, at galdandi løgtingslóg verður broytt, ella at løgtingslóg verður sett úr gildi. Kann hugskotið t.d. førast út í lívið við upplýsing, áheitan ella øðrum tiltøkum, eigur hesin hátturin at nýtast. Nýggj løgtingslóg, broyting í løgtingslóg ella úrgildisseting av løgtingslóg, eigur einans at gerast um hetta er neyðugt.

## 2. Upprit

Verður mett, at hugskotið krevur at løgtingslóg verður gjørd, broytt, ella sett úr gildi, má landsstýrisfólkið fyrst fáa politiska undirtøku fyri hesum í samgonguni.
Skrivað verður eitt upprit sum lýsir málið, og sum verður lagt fyri á *politiskum* landsstýrisfundi. Uppritið verður skrivað í serliga skabelón, sum stjórnartænastan á Løgmansskrivstovuni hevur tilevnað til endamálið. Skabelónin er tøk á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni, og eitur "Leistur til upprit til landsstýrisfund".
Sí eisini skrivið "Um at samskipa politisk mál" frá stjórnartænastuni á Løgmansskrivstovuni.

## 3. Upprit til politiskan landsstýrisfund

Politiskir landsstýrisfundir eru hvønn týsmorgun kl. 9:00.
Uppritið skal vera Løgmansskrivstovuni í hendi seinast mikudagin áðrenn kl. 13:00.
Uppritið skal sendast til: fundur@tinganes.fo

## 4. Uppskot verður tilevnað

Hevur landsstýrisfólkið fingið undirtøku á landsstýrisfundinum fyri, at arbeiða víðari við uppskotinum, fer stjórnarráðið undir at tilevna sjálvt uppskotið.
Uppskotið kann vera gjørt av stjórnarráðinum einsamøllum, stjórnarráðið kann leita sær hjálp hjá einum av sínum undirliggjandi stovnum, ella stjórnarráðið kann seta ein arbeiðsbólk, nevnd ella tílíkt, at tilevna uppskotið.
Uttan mun til hvønn arbeiðshátt stjórnarráðið velur at nýta, so er tað altíð stjórnarráðið einsamalt, sum hevur endaligu ábyrgdina av uppskotinum.

## 5. Undaneftirkanning

Størri løgtingslógaruppskot, eitt nú nýggjar høvuðslógir, umfatandi broytingarlógir og lógarpakkar, eiga at latast Lógartænastuni í Løgmálaráðnum til undaneftirkanningar. Sí rundskriv um eftirkanning viðvíkjandi undaneftirkanningum.
Tað er stjórnarráðið sjálvt, sum metir um, um uppskotið eigur at sendast til undaneftirkanningar.

## 6. Tryggja politiska undirtøku

Í tilgongdini at gera lógaruppskotið skal landsstýrisfólkið tryggja sær politiska undirtøku. Júst hvussu hetta verður gjørt avger einstaka landsstýrisfólkið. Tað kann vera við at bjóða samgonguflokkunum, samgongutinglimum í viðkomandi tingnevnd í Løgtinginum til fundir, framløgur o.tíl. Annar háttur er at leggja uppskotið á politiskan landsstýrisfund og biðja um undirtøku at senda uppskotið til ummælis, eftir at tað hevur verið sent samgonguflokkunum til kunningar og møguligar viðmerkingar.
Landsstýrisfólkið skal tryggja sær, at tað ikki skapar óneyðugt órógv í politiska baklandinum, tá uppskotið verður latið til ummælis og lagt út á almenna ummælisportalin. Viðkomandi politikarar í samgonguni mugu tí í minsta lagi kenna uppskotið, áðrenn ummælistilgongdin byrjar

## 7. Uppskot verður sent til ummælis hjá útvaldum pørtum

Snýr uppskotið seg um at einskilja fyritøkur landsins skulu “Leiðreglur um at einskilja fyritøkur landsins” fylgjast. Leiðreglurnar eru tøkar á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni.
Snýr uppskotið seg um at áseta reglur, sum viðvíkja landsins roknskaparverki, skal uppskotið leggjast fyri Fíggjarmálaráðið til góðkenningar. Sí kunngerð um roknskaparverk landsins o.t.
Snýr uppskotið seg um eitt verklag skal uppskotið sendast serstakt til Fíggjarmálaráðið til ummælis.

## 8. Uppskot verður sent til ummælis alment

Tá stjórnarráðið metir, at uppskotið er liðugt verður uppskotið sent til ummælis hjá almenninginum.
Uppskotið verður sent beinleiðis til øll tey, sum mugu metast at hava ein serligan áhuga í uppskotinum, og uppskotið verður lagt út á almenna ummælisportalin hjá Føroya landsstýri. Uppskotið skal sendast til: hoyring@tinganes.fo
Ummælisfreistin eigur at vera minst 4 vikur.

## 9. Viðgerð av ummælum

Stjórnarráðið viðger ummæli sum koma til uppskotið, og tillagar uppskotið samsvarandi tí, sum stjórnarráðið metir tænir uppskotinum best.
Verður uppskotið broytt grundleggjandi, eigur stjórnarráðið at umhugsa, at senda broytta uppskotið til ummælis av nýggjum sambært nr. 10 niðanfyri.

## 10. Uppskot verður sent til endurummælis

Um innkomnu ummælini viðføra, at uppskotið verður broytt grundleggjandi, ella at stórir partar av uppskotinum verða broyttir, eigur uppskotið at vera sent út aftur til ummælis alment sambært mannagongdini í nr. 9. Tað er stjórnarráðið sum metir um, um hetta er neyðugt.
Ummælisfreistin eigur at vera minst 4 vikur.

## 11. Uppskot verður sent til eftirkanningar

Tá uppskotið er endaligt, og tær broytingar, sum stjórnarráðið metir skulu gerast í uppskotinum, eru gjørdar, verður uppskotið sent til eftirkanningar hjá lógartænastuni í Løgmálaráðnum.
Við uppskotinum skula eisini leggjast tey innkomnu ummælissvarini, umframt annað tilfar, sum er viðkomandi fyri uppskotið. Uppskot og tilfar skal sendast til: eftirkanning@lmr.fo.
Lógartænastan skal hava í minsta lagi 5 yrkadagar til eftirkanning. Í serligum førum, tá arbeiðsbyrðan hjá lógartænastuni kann væntast at vera stór, t.d. undan seinasta framløgudegi, kann roknast við, at eftirkanning tekur longri enn 5 yrkadagar.

## 12. Uppskot verður sent til politiskan landsstýrisfund

Tá stjórnarráðið hevur viðgjørt viðmerkingarnar frá lógartænastuni á Løgmálaráðnum og hevur gjørt tær broytingar, sum stjórnarráðið metir eru neyðugar, verður endaliga uppskotið sent til politiskan landsstýrisfund.
Uppritið nevnt í nr. 2 og mannagongdin í nr. 3 verða at nýta.

## 13. Uppskot verður sent til ummælis hjá samgonguflokkunum

Um landsstýrið tekur undir við uppskotinum, sum tað nú fyriliggur, verður uppskotið av viðkomandi stjórnarráði sent til ummælis hjá samgonguflokkunum.
Ummælisfreistin eigur at vera minst 1 viku.

## 14. Ummælini frá samgonguflokkunum verða viðgjørd

Tá ummælini eru komin frá samgonguflokkunum verða tey viðgjørd av stjórnarráðnum.

## 15. Uppskot verður latið umsitingini í Løgtinginum

Uppskotið verður síðani latið umsitingini í Løgtinginum til eftirkanning. Tað er stjórnarráðið sjálvt, sum letur umsitingini í Løgtinginum uppskotið. Her skal serliga mannagongdin fylgjast, sum Løgtingið hevur ásett í "Mannagongd í sambandi við løgtingsmál at lata Løgtinginum". Mannagongdin liggur á heimasíðuni hjá Løgtinginum.

## 16. Uppskot verður sent á formligan landsstýrisfund

Tá ið stjórnarráðið hevur viðgjørt eftirkanningina hjá Løgtinginum, er uppskotið búgvið at senda til formliga landsstýrisfund.
Sambært § 33, stk. 2 í stýrisskipan Føroya samskipar løgmaður starv landsstýrisfólka og boðar í hesum sambandi regluliga til landsstýrisfundar, har m.a. øll uppskot landsstýrisins til løgtingslógir og ríkislógartilmæli o.a. verða løgd fram, áðrenn tey verða løgd fyri Løgtingið. Hesir fundir verða kallaðir formligir landsstýrisfundir í mun til teir politisku landsstýrisfundirnar.
Á formligum landsstýrisfundi verður bert staðfest, at uppskotið verður lagt fyri Løgtingið. Eingin viðger av uppskotinum fer fram. Uppskotið skal sendast til: formfundur@tinganes.fo

## 17. Uppskot verður lagt fram í Løgtinginum

At enda verður uppskotið lagt fram í Løgtinginum. Her eru serligar mannagongdir og tíðarfreistir galdandi, sí Tingskipan Løgtingsins. Tá ið uppskotið er lagt fram í Løgtinginum, er tað ikki longur landsstýrið sum varðar av uppskotinum, men Løgtingið. Landsstýrið kann tá ikki longur gera broytingar í uppskotinum. Landsstýrið kann tó heita á Løgtingið, t.v.s. løgtingsnevndina sum hevur uppskotið til viðgerðar, um at gera møguligar broytingar í tí.

## 18. Serligt um kunngerðir

Tá ið kunngerð hevur verið á politiskum landsstýrisfundi, sambært nr. 12, verður hon send til kunngeringar. Sí mannagongd í rundskrivi um kunngering av løgtingslógum og kunngerðum o.tíl.